# Ársroknskapur
## Årsregnskab

# 2007

TRYGD

hugsar um teg.

| Innihaldsyvirlit | Síða |
|---|---|
| Leiðslufrágreiðing | 2 |
| Ledelsesberetning | 5 |
| Nýttur roknskaparháttur | 8 |
| Anvendt regnskabspraksis | 9 |
| Gongdin seinastu 5 árini | 10 |
| Udviklingen over 5 ár | 10 |
| Rakstrarúrslit | 11 |
| Resultatopgørelse | 11 |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember | 12 |
| Balance pr. 31. december | 12 |
| Viðmerkingar til ársroknskapin | 13 |
| Noter til årsregnskabet | 13 |
| Átekning | 16 |
| Påtegninger | 16 |
| Grannskoðaraátekningar | 17 |
| Revisionspåtegninger | 17 |

**P/F TRYGD**
Gongin 7
Postboks 44
FO 110 Tórshavn
Tlf. +298 358100
Fax +298 317211

E-mail: trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Pf.skr.nr.8, Tórshavn
V-tal nr. 324.086

**Elsta tryggingarfelag í Føroyum**
TRYGD er elsta tryggingarfelag í Føroyum. Felagið varð stovnað 4. august 1932, og bleiv sostatt 75 ár í 2007. Stovningardagurin varð hátíðarhildin við stórari samkomu í Norðurlandahúsinum í august og gallaveitslu í september.

Í samband við føðingardagin fingu heildarkundarnir á privatøkinum hvør sína fyrstuhjálpartasku í gávu, og størri vinnukundar fingu tilboð um sonevnda termografering, har el-talvur verða kannaðar fyri skammbrotsfeilir, sum er til gagns fyri kundarnar.

Frá 1940 til 1997 – í 57 ár – var tó einkarrættur galdandi á føroyska tryggingarmarknaðinum, og tað var ikki fyrr enn 1. februar 1998, at felagið aftur byrjaði at selja tryggingar. TRYGD kann tí í 2008 hátíðarhalda 10 ára dagin fyri, at kapping aftur er á føroyska skaðatryggingarmarknaðinum.

**Marknaðurin**
Kappingin á føroyska marknaðinum fyri skaðatryggingar var ikki fyri stórvegis broytingum í 2007, men enn sum áður hevur prískapping verið millum feløgini bæði.

Tá ið TRYGD byrjaði av nýggjum í 1998, hevði hetta við sær munandi lægri prísir á tryggingarmarknaðinum, samstundis sum dygdin á tryggingunum bleiv betri. TRYGD hevur greiðan málsetning um at selja góðar tryggingar, og veita góða tænastu, sum kundarnir eru glaðir fyri. Prískapping er tí ikki einasta loysnin fyri framhaldandi at bøta um marknaðarstøðuna og lønsemi.

Nógv bendi eisini á, at ein kappingarneyti fór at koma á marknaðin aftrat í 2007. Íslendskt tryggingarfelag fyrireikaði seg at lata upp eina deild í Føroyum, men hetta krevur eina broyting í lógini um tryggingarvirksemi.

Galdandi tryggingarlóggáva forðar útlendskum feløgum at virka í Føroyum. Og hóast ætlaðu broytingarnar í lógini vórðu samtyktar við fyrstu viðgerð í tinginum, nevndarálit var skrivað, kom lógaruppskotið ikki til aðru viðgerð, áðrenn nývalg varð skrivað út í desember.

Føroysku tryggingarfeløgini kunnu sambært galdandi ásetingum millum Ísland og Føroyar , um tey fáa serstaka góðkenning frá íslendska tryggingareftirlitinum, selja tryggingar í Íslandi,. TRYGD hevur gjørt kanningar av marknaðinum, men støða er ikki tikin til, um meira skal gerast burtur úr hesum.

**Lóggáva**
Umframt broytingar í lógini um tryggingarvirksemi, ið eru ávegis, hevur uppskot til nýggja arbeiðsskaðalóg verið ávegis í fleiri ár.

Uppskotið til arbeiðsskaðalóg varð tó ikki borið í tingið í 2007, helst tí tað dróg út at finna semju um ein hóskandi leist at fíggja partin um vinnusjúkur. Tað tóktist heldur ikki millum tryggingarfeløgini og myndugleikarnar vera full semja um restina av uppskotinum.

Ein dagførd útgáva av lógini um endurgjaldsábyrgd var, sambært landsstýrismanninum við innlendismálum, í umbúna.

Skipanin við meirvirðisgjaldsundantaki til bygging og umvæling av egnum bústaði varð broytt í árinum til eina mvg-stuðulsskipan. Lógarbroytingin kann hava við sær munandi hægri útreiðslur til endurgjøld fyri tryggingarfeløgini, tí myndugleikarnir tulka lógina soleiðis, at tryggingarskaðar ikki eru fevndir av lógini um mvg-stuðul. Í gomlu skipanini við mvg-undantaki vóru eisini tryggingarskaðar fevndir, men hetta er brádliga, uttan nakra varing, broytt. Hetta er avgjørt ikki nøktandi.

Tryggingarfeløgini hava í tveimum umførum skrivliga mælt landsstýrinum til, at tulkingin av lógini verður broytt, so hon fylgir andanum í mvg-undantakinum – tað vil siga veitir mvg-stuðul til tryggingarskaðar. Tryggingarfeløgini hava eisini í felag átalað, at lógarbroytingarnar ongantíð vórðu sendar feløgunum til hoyringar.

**Tryggingargjøld**
Bruttotryggingargjøldini øktust framhaldandi í 2007. Úr 72 mió. kr. í 2006 upp í knappar 82 mió.kr., svarandi til ein vøkstur upp á góð 13%. Vøksturin stavar frá vaksandi tryggingartørvi umframt øktum marknaðarparti innan flestu tryggingargreinar.

Vøksturin í bruttotryggingargjøldunum á privatøkinum var 10%. Tilsvarandi vøkstur á vinnu- og sjóøkinum var ávíkavist 20% og 12%.

**Skaðagongdin**
Skaðagjøldini í 2007 vóru lutfalsliga lág sæð í mun til samlaðu tryggingargjøldini og í mun til undanfarna ár.

Samlaðu skaðaútreiðslurnar fyri egna rokning vóru í 2007 umleið 36 mió.kr. í mun til 34 mió.kr. árið fyri. Hetta er ein vøkstur upp á 7%, men samstundis eru tryggingargjøldini fyri egna rokning økt 13%.

Samlaða skaðaprosentið í 2007 var 50 (brutto) í mun til 54 árið fyri.

Í 2007 var talan um ein stóran sethúsaeld. Húsaskaðarnir hava annars verið munandi færri enn árið fyri. Skaðaprosentið fyri privat sethús varð 56 í 2007 ímóti 70 í 2006.

Tað hava verið rímiliga nógvir bilskaðar í 2007, við einum hægri skaðaprosenti fyri 2007 í mun til 2006. Samlaða úrslitið innan biltryggingarøkið var í 2007 á leið tað sama sum árið fyri. Vegna økta sølu er hetta tí ikki heilt nøktandi.

Á sjóvátryggingarøkinum hevur av størri skaðum verið talan um skip, ið hevur borið við land, motorbrek, sleip og eisini onkran stormskaða. Úrslitið av sjóvátryggingum var tó nøktandi í 2007.

Innan onnur tryggingarøkir, undantikið onkra einstaka vinnuliga tryggingargrein, hava úrslitini eisini verið nøktandi.

**Endurtrygging**
Endurtryggingarskipanin hjá TRYGD fyri 2007 var so at siga óbroytt í mun til árið frammanundan.

Í 2006 varð skipanin annars broytt munandi, so at TRYGD m.a skuldi rinda fyri vanligar skaðar fyri egna rokning. Størri váðar og skaðar, eitt nú stormur og katastrofa, vóru, og eru, tó framhaldandi endurtryggjað.

**Tryggingartekniskt úrslit**
Tryggingartekniska úrslitið fyri 2007 var 4,2 mió.kr. ímóti 4,5 mió.kr. árið fyri.

Úrslitið er betri enn væntað, hóast rakstrarútreiðslurnar øktist úr 21,0 mió.kr. í fjør upp í 26,8 mió.kr. Nakrar av hesum útreiðslum vóru í samband við 75 ára haldið, umbyggingina, ið varð liðug í 2007, og stjóraskiftið.

Ein høvuðsorsøk til góða tryggingartekniska úrslitið er, hóast útreiðslurnar eru øktar, at skaðaendurgjøldini vóru lutfalsliga lægri í 2007 enn árið fyri.

**Gongdin í felagnum**
Tað hevur verið skiftið innan leiðsluna av felagnum í 2007. Ali Celebi fór úr starvi sum stjóri 1. juli 2007 og Niels Juel Arge røkti starvið sum fyribils stjóri restina av árinum.

Tann 1. januar 2008 varð Jean Djurhuus settur sum stjóri í TRYGD. Hann hevur seinni nógvu árini havt fleiri leiðandi størv í Føroya Banka.

TRYGD legði í 2007 framhaldandi herðslu á broytingar og menning, bæði innanhýsis og mótvegis kundunum, tó at felagið varð nakað darvað av stjóraskiftinum.

1. januar 2007 yvirtók TRYGD nýggj høli næst at teimum núverandi hølunum í Gongini. Umbygging av hølunum fór í gongd í 2006, og varð liðug í 2007. Hølisviðurskiftini mugu nú sigast at vera nøktandi.

Við árslok 2007 vóru 31 fulltíðarstarvsfólk í felagnum samanborið við 26 fólk í 2006. Eisini eru ráðgevar í fríari vinnu tilknýttir felagnum, serliga sum sýnsmenn.

**Ársúrslit**
TRYGD hevði í 2007 eitt avlop á 8,4 mió.kr. áðrenn skatt. Úrslitið árið fyri var 7,0 mió.kr. Ársúrslitið eftir skatt var 6,9 mió.kr. ímóti 5,7 mió.kr. árið fyri.

Leiðslan er nøgd við úrslit felagsins. Hetta hóast øktar rakstrarútreiðslur, sum í høvuðsheitum verða útjavnaðar av jaligu skaðagongdini og økta avkastinum av fíggjaríløgum.

Fíggjarinntøkurnar øktust munandi í 2007. Úr 3,8 mió.kr. upp í 6,1 mió.kr., svarandi til ein vøkstur upp á heili 62%. Vøksturin stavar í høvuðsheitum frá hækkaðum rentustøðið.

Rakstrarútreiðslurnar hava tó verið lutfalsliga høgar í 2007. Herav eru tó útreiðsluføring av umbyggingini og stjóraskiftininum, á góðar 3 mió.kr., at meta sum útreiðslur, sum ikki eru árliga afturvendandi.

Skatturin av ársúrslitinum varð 1,5 mió.kr.

**Ársavlop**
Nevndin skjýtur upp, at 19 mió.kr. verða goldnar út í vinningbýti til partaeigaran, Føroya Banka.

TRYGD útlutar sostatt ársúrslitið fyri 2007 upp á 6,9 mió.kr., og nýtir 12,1 mió.kr. av fríum reservum til útlutan til partaeigaran.

**Eginogn felagsins**
Við árslok 2007 var eginognin 85,3 mió.kr., eftir at 19,0 mió.kr. eru settar av til vinningsbýti. Føroya Banki eigur allan partapeningin á 40 mió kr.

**Útlit fyri 2008**
Leiðslan væntar ávísa øking í tryggingargjøldum frá øktum marknaðarluti innan flestu tryggingargreinar. Tó er væntandi, at skaðaendurgjøldini verða lutfalsliga størri í 2008, orsaka av nógvum skaðum, sum hava staðist av vánaligum veðurlíkindum í byrjanini av 2008.

Nýggj tryggingarlóggáva, og møguligir nýggir kappingarneytar á tryggingarmarknaðinum, vilja væntandi viðføra meira dynamik, og størri útboð av tryggingarproduktum. Um so verður kann væntast, at prískappingin herðist, og kemur hetta eisini at gagna tryggingartakararnum.
Tryggingartekniska úrslitið hevur verið støðugt seinnu 2 árini. Vánalig skaðahagtøl í byrjanini av 2008 hava við sær, at trupult verður at bøta um hetta úrslit í 2008. Størri fokus verður sett á útreiðslustýring felagsins, fyri at bøta um samlaða úrslitið.

TRYGD arbeiðir miðvíst við at bøta um rentingina av eginogn felagsins. Fyri miðvíst at fáa eina hóskandi eginogn í mun til virksemi, innstillar nevndin, at felagið útlutar íalt 19,0 mió.kr. í vinningsbýti fyri 2007.

TRYGD er Færøernes ældste forsikringsselskab. Selskabet blev etableret den 4. august 1932 og kunne derfor holde 75 års jubilæum í 2007. Jubilæet blev fejret både med stor sammenkomst i Norðurlandahúsið i august, samt gallafest i september.

I forbindelse med jubilæet forærede TRYGD en forbindingskasse til samtlige helkunder som tak for det gode samarbejde, samtidig med at de største erhvervskunder fik tilbudt termografering af deres el-tavler for at finde frem til mulige kortslutningsfejl, som er til gavn for kunderne.

I årene fra 1940 til 1997 – i 57 år – var der monopol gældende for det færøske forsikringsmarked, og det var ikke før end 1. februar 1998, at TRYGD igen fik mulighed for at sælge forsikringer. TRYGD kan derfor i 2008 fejre 10 års jubilæum for genoptagelse af konkurrencen på det færøske skadesforsikringsmarked.

**Markedet**

Konkurrencesituationen på det færøske skadesforsikringsmarked var stort set den samme som i 2006, med blandt andet intensiv priskonkurrence mellem de to selskaber på markedet.

TRYGD's genindtræden på det færøske skadesforsikringsmarked i 1998 førte med sig væsentlig lavere priser, samtidig med at kvaliteten af forsikringsprodukterne blev bedre. TRYGD har en klar målsætning om at sælge et godt produkt, og yde en god service, som kunderne er glade for. Priskonkurrence er derfor ikke den eneste løsning til fortsat at bedre markedssituationen og lønsomheden.

Meget tydede også på at yderligere en aktør ville gøre sin indtræden på det færøske marked i 2007 i form af et islandsk forsikringsselskab, men dette kræver en lovændring før det kan lade sig gøre.

Gældende lovgivning tillader ikke udenlandske selskaber at operere på Færøerne. Til trods for at de påtænkte lovændringer blev vedtaget af Lagtinget ved første behandling, og erhvervsudvalget havde udarbejdet betænkning, nåede lovforslaget aldrig at komme til anden behandling på grund af at der i december blev udskrevet lagtingsvalg.

Ifølge gældende aftaler mellem Island og Færøerne, kan færøske forsikringsselskaber, med særlig tilladelse fra de islandske myndigheder, drive forsikringsvirksomhed på Island. TRYGD har undersøgt mulighederne på dette marked, men har endnu ikke besluttet hvorvidt selskabet i fremtiden vil gøre sin entre på dette marked.

**Lovgivningen**

Blandt de mange forestående ændringer i forsikringsloven, er også et forslag til ændring i arbejdsskadeloven, der har været undervejs i mange år.

Forslaget til arbejdsskadelov blev dog ikke forelagt Lagtinget i 2007. Helst på grund af uenigheder vedrørende finansiering af erhvervssygdomme. Der synes også at være uenigheder mellem forsikringsselskaberne og myndighederne på andre punkter.

Ifølge indenrigsministeren er en opdateret udgave af loven om erstatningsansvar på vej.

Loven om undtagelse af mvg(moms) i forbindelse med bygning og ombygning af egen bolig, blev ændret i 2007 til et mvg-støtteprogram. Myndighedernes fortolkning af ændringen i loven kan påføre forsikringsselskaberne væsentlige udgifter i form af skadesudbetalinger, idet loven fortolkes således, at forsikringsskader ikke er omfattet af mvg-støtteprogrammet. I de tidligere regler om mvg-undtagelse, var forsikringsskader omfattet, men dette er pludselig, og uden advarsel, blevet ændret. Dette er ikke tilfredsstillende.

Forsikringsselskaberne har i to omgange skriftligt henvendt sig til landsstyret om at få ændret tolkningen af loven således, at denne fortsat følger hensigten i gamle lov om mvg, dvs. at forsikringsskader også skal være indbefattede. Forsikringsselskaberne har også påtalt, at lovændringerne aldrig blev sendt selskaberne til høring.

**Præmieindtægter**

Bruttopræmieindtægterne steg fortsat i 2007. Fra 72 mio. kr. i 2006 til knap 82 mio. kr., svarende til en vækst på godt 13%. Væksten afspejler en stigende efterspørgsel efter forsikring samt TRYGD's øgede markedsandel indenfor flere kategorier.

Væksten i bruttopræmieindtægterne var på 10% for privat. Tilsvarende vækst på erhverv og marine var henholdsvis 20% og 12%.

**Skadesforløbet**

Skadeserstatningsudgifterne i 2007 var forholdsvis lave set i forhold til de samlede præmieindtægter, og i forhold til forrige år.

Samlet udgjorde skadeserstatningsudgifterne for egen regning 36 mio. kr. i 2007 i forhold til 34 mio. kr. året før. Dette er en stigning på 7%, samtidig med at præmieindtægterne for egen regning steg 13% i samme periode.

Bruttoskadeprocenten i 2007 var 50 i forhold til 54 i 2006.

I 2007 forekom der én større brandskade i parcelhus. Skader på parcelhuse har ellers været en del mindre end året før. Skadesprocenten for private huse i 2007 var 56. I 2006 var skadesprocenten 70.

Indenfor bilmarkedet har der været rimelig mange skader i 2007, som har medført en højere skadesprocent end i 2006. Det samlede resultat for denne branche blev nogenlunde det samme i 2007 som i 2006. Henset til det øgede salg, anses resultatet som værende ikke helt tilfredsstillende.

På Marineområdet har der af større skader på skibe været tale om land-påsejlinger, skader på motorer, bugsering og enkelte stormskader. Det samlede resultat for marineforsikringer var dog tilfredsstillende.

Indenfor andre forsikringsområder, bortset fra enkelte erhvervsgrene, har resultatet også været tilfredsstillende.

**Reassurance**
TRYGD's reassuranceprogram for 2007 blev stort set ikke ændret i forhold til året før.

I 2006 blev dog foretaget større ændringer i reassuranceprogrammet, således at TRYGD bl.a. kom til at betale for almindelige skader for egen regning. Større risici og skader, herunder storm og katastrofe, var, og er, fremdeles reassureret.

**Forsikringsteknisk resultat**
TRYGD fik i 2007 et forsikringsteknisk resultat på 4,2 mio. kr. i forhold til 4,5 året før.

Resultatet er bedre end forventet, selv om driftsomkostningerne steget fra 21,0 mio. kr. til 26,8 mio. kr. Ud over den almindelige drift, skyldes stigningen i omkostningerne TRYGD's 75 års jubilæum, ombygningen af TRYGD´s lokaler, som blev fuldført i 2007, samt direktørskifte.

En af hovedårsagerne til det gode forsikringstekniske resultat skyldes, på trods af en stigning i driftsomkostningerne, forholdsvis lavere skadeserstatningsudbetalinger i 2007 end 2006.

**Selskabets udvikling**
I 2007 er der sket ændringer i ledelsen. Ali Celebi fratrådte stillingen som direktør den 1. juli 2007 og Niels Juel Arge blev konstitueret direktør resten af året.

Den 1. januar 2008 blev Jean Djurhuus ansat som ny direktør i TRYGD. Han har gennem de seneste mange år bestridt flere forskellige lederposter i Føroya Banki.

TRYGD fortsatte i 2007 med at fokusere på ændringer og udvikling, både internt og i forhold til kunderne, med henblik på fortsatte forbedringer, dog at selskabet var noget påvirket af direktørskiftet.

1. januar 2007 udvidede TRYGD lejemålet til også at omfatte nabobygningen i Gongini. Ombygningen startede i 2006 og stod færdig i 2007. Lokalerne må nu siges at være tilfredsstillende.

Ultimo 2007 var der 31 heltidsansatte sammenlignet med 26 i 2006. Derudover er rådgivere tilknyttet selskabet, specielt i form af inspektører til skadesvurdering.

**Årets resultat**
TRYGD leverede i 2007 et overskud på 8,4 mio. kr. før skat. Resultatet året før var 7,0 mio. kr. Årets resultat efter skat var 6,9 mio. kr. sammenlignet med 5,7 mio. kr. året før.

Ledelsen anser resultatet som tilfredsstillende. De øgede driftsomkostninger kompenseres med det forholdsvis lave skadeserstatningsniveau, samt øget finansielt afkast.

De finansielle indtægter steg betydeligt i 2007. Fra 3,8 mio. kr. i 2006 til 6,1 mio. kr. i 2007, svarende til en samlet vækst på 62%. Væksten stammer primært fra rentestigninger.

Driftsomkostningerne har dog været relativt høje i 2007. Heraf er omkostninger til ombygning og direktørskifte, svarende til godt 3 mio. kr., der må anses som ikke tilbagevendende omkostninger.

Skat af årets resultat udgjorde 1,5 mio. kr.

**Overskudsdisponering**
Bestyrelsen foreslår, at der udbetales 19 mio. kr. i udbytte til aktionæren, Føroya Banki.

TRYGD udlodder således udover årets overskud for 2007 6,9 mio. kr. også 12,1 mio. kr. af frie reserver.

**Selskabets kapitalforhold**
Ved udgangen af 2007 androg TRYGD's egenkapital således 85,3 mio. kr., efter reservation af 19,0 mio. kr. til udbytte. Aktiekapitalen, der andrager 40 mio. kr., ejes i sin helhed af P/F Føroya Banki.

**Forventninger til 2008**
Ledelsen forventer en vis stigning i præmieindtægterne som følge af større markedsandele indenfor de fleste forsikringsområder. Dog forventes, at skadesudgifterne bliver større i 2008 på grund af forholdsvis mange skader forårsaget af dårligt vejr i starten af 2008.

Ny lov om forsikring og mulighed for nye konkurrenter på forsikringsmarkedet, vil formentlig medføre øget dynamik og større udbud af forsikringstilbud. I givet fald forventes der samtidig øget priskonkurrence, som følgelig vil være til gavn for forsikringskunderne.

Det forsikringstekniske resultat har været stabilt de sidste to år. Høje skadeserstatningsudgifter i starten af 2008 vanskeliggør et godt resultat for 2008, hvorfor større fokus vil være på omkostningsstyring med henblik på forbedring af det samlede resultat.

TRYGD arbejder fokuseret på at forbedre forrentningen af virksomhedens egenkapital. For at forbedre balancen imellem egenkapitalen og selskabets drift, har bestyrelsen besluttet at selskabet udlodder i alt 19,0 mio. kr. i udbytte for 2007.

**Alment**
Ársroknskapurin hjá TRYGD er gjørdur í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi og í samsvari við alment góðkendar roknskaparreglur.
Nýttur roknskaparháttur er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

**Tryggingargjøld**
Tryggingargjøld verða tíðaravmarkað, soleiðis at inntøkur verða tiknar við í tann mun, tær eru tengdar at roknskaparárinum.

**Latin endurtryggingargjøld**
Tryggingargjøld til endurtryggingarfeløg verða tíðaravmarkað, soleiðis at útreiðslur verða tiknar við í tann mun, tær eru tengdar at roknskaparárinum.

**Endurgjøld/endurgjaldsburturleggingar**
Endurgjaldsburturleggingar og áogn av skaðum, eru uppgjørd eftir einsæris metingum av hvørjum skaða sær, sum ikki er endaliga uppgjørdur. Íroknað endurgjaldsburturleggingar, er eisini ein eykaupphædd á 5% fyri hendar, men ikki fráboðaðar skaðar, og eitt eyka fríhald á 10% til óvæntaðar skaðaútreiðslur.

**Tryggingarteknisk renta**
Tryggingartekniska rentan er roknað sum 4,34% av miðalstøddini á tryggingarburturleggingum fyri egna rokning.

**Endurtryggingarfulnaður**
Gjøld frá endurtryggjaranum viðvíkjandi meldaðum skaðum verða tíðaravmarkað, soleiðis at hesi verða tikin við í tann mun, tey eru tengd at roknskaparárinum.

**Fastir ognir**
P/F TRYGD eigur eini tvíhús, hvørs virði er ásett til marknarvirði.

**Lánsbrøv**
Lánsbrævagoymsla felagsins er virðissett sambært almennum kursum við árslok.

**Innbúgv og rakstrartól**
Innbúgv og rakstrartól felagsins eru bókað til keypsprís, frádrigið av- og niðurskrivingar. Ognirnar verða avskrivaðar liniert, grundað á ætlaða nýtslutíð eftir 3 til 5 ár.
Útveganir av rakstrargøgnum fyri undir 20 tkr. verða útreiðsluførdar.
Ritbúnaður (software) verður útreiðsluførdur í útveganarárinum.

**Skattur**
Skattur er samansettur av skatti av skattsskyldugu inntøkuni fyri árið og javning av útsettum skatti. Skatturin av skattskyldugu inntøkuni í árinum verður útreiðsluførdur í rakstrarúrslitinum við 18%. Útsetti skatturin verður avsettur við 18% av muninum millum roknskaparlig og skattlig virði á ogn og skuld.

**Handlar innan samtakið**
Við handli millum feløg í samtakinum og millum samstarvsfyritøkur, eins og tá hesi gera arbeiðið hvørt fyri annað, verða avroknað sambært marknaðartreytum ella á einum útreiðslunøktandi grundarlagi.

**Generelt**
Årsregnskabet er udarbejdet i overensstemmelse med lov om forsikringsvirksomhed, samt almindelig anerkendt regnskabspraksis.
Anvendt regnskabspraksis er uændret i forhold til sidste år.

**Præmier/præmiehensættelser**
Præmieindtægten periodiseres, således at indtægten svarer til regnskabsåret andel.

**Afgivne genforsikringspræmier**
Præmier til ressurandører periodiseres, således at udgiften svarer til regnskabsårets andel.

**Erstatninger/erstatningshensættelser**
Erstatningshensættelser og tilgodehavender vedrørende skader opgøres efter en individuel vurdering af hver uafsluttet skade. I erstatningshensættelserne indgår endvidere en reserve på 5% til indtrufne, men ikki anmeldte skader og en ekstra stødpudereserve på 10% til forudsete skadeudgifter.

**Forsikringsteknisk rente**
Den forsikringstekniske rente bregnes som 4,34% af de gennemsnitlige forsikringsmæssige hensættelser for egne regning.

**Genforsikringsdækning**
Reassurandørens andel af anmeldte skader periodiseres, således at indtægten svarer til regnskabsårets andel.

**Bygninger**
TRYGD ejer 1 sammenbygget rækkehus, hvis værdi er ansat til markedsværdi.

**Værdipapirer**
Selskabets obligationsbeholdning er optaget til den senest noterede officielle kurs.

**Inventar, edb anlæg, bil m.v.**
Inventar, edb anlæg og selskabets biler er opført til anskaffelsessum, reguleret for af- og nedskrivninger. Der foretages liniære afskrivninger baseret på aktivernes forventede driftsøkonomiske levetid på mellem 3 og 5 år.
Anskaffelse af driftsmateriel under 20 tkr. udgiftsføres.
Software udgiftsføres i anskaffelsesåret.

**Skat**
Årets skatteudgift omfatter skat af årets skattepligtige indkomst samt regulering af udskudt skat.
Skat af årets skattepligtige indkomst udgiftsføres i resultatopgørelse med 18%.

Udskudt skat hensættes efter den balanceorienterede gældsmetode med 18% af midlertidige forskelle mellem regnskabs- og skattemæssige værdier af aktiver og passiver.

**Koncerninterne transaktioner**
Transaktioner mellem koncernes selskaber og associerede virksomheder afregnes på markedsbaserede vilkår eller på omkostningsdækkede basis.

## Høvuðstøl / Hovedtal

| DKK 1.000 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld f.e.r / Præmieindtægter f.e.r. | 34.508 | 41.576 | 49.720 | 57.870 | 65.207 |
| Skaðagjøld f.e.r / Erstatningsudgifter f.e.r. | -26.254 | -28.601 | -35.823 | -33.654 | -36.054 |
| Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r. / Forsikringsmæssige driftsomkostninger f.e.r. | -9.475 | -12.127 | -15.813 | -21.030 | -26.824 |
| Tryggingartekniskt úrslit / Forsikringsteknisk resultat | **-652** | **1.449** | **-1.145** | **4.532** | **4.226** |
| Úrslit av íløguvirksemi / Resultat af invest. virksomhed | 3.013 | 3.158 | 3.306 | 2.435 | 4.211 |
| Ársúrslit / Årets resultat | **1.889** | **3.694** | **1.720** | **5.706** | **6.918** |
| Forsikringsmæssige hensættelser f.e.r. | 21.811 | 24.847 | 36.858 | 39.485 | 36.336 |
| Eginpeningur / Egenkapital | 116.305 | 119.999 | 121.719 | 97.425 | 85.343 |
| Ognir tilsamans / Aktiver i alt | 148.266 | 157.017 | 173.551 | 183.080 | 158.483 |

| | DKK 1.000 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|
| | Tryggingargjøld, brutto / Bruttopræmier | 81.548 | 71.941 |
| | Latin endurtryggingargjøld / Afgivne genforsikringspræmier | -13.368 | -11.376 |
| | Broyting í avsetingum til tryggingargjøld / Ændring i bruttopræmiehensættelser | -3.250 | -2.662 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til tryggingargjøld / Ændring i genforsikringsandel af præmiehensættelser | 277 | -33 |
| | **Tryggingargjøld f.e.r. / Præmieindtægter f.e.r.** | 65.207 | **57.870** |
| 1 | **Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Forsikringsteknisk rente f.e.r.** | 1.897 | **1.346** |
| | Útgoldin skaðagjøld, brutto / Udbetalte bruttoerstatninger | -46.342 | -38.695 |
| | Endurgoldið frá endurtryggingingini / Modtaget genforsikringsdækning | 4.166 | 4.973 |
| | Broyting í avsetingum til skaðagjøld / Ændring i bruttoerstatningshensættelser | 6.878 | 1.007 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til skaðagjøld / Ændring i genforsikringsandel af erstatningshensættelser | -756 | -939 |
| | **Skaðagjøld f.e.r. / Erstatningsudgifter f.e.r.** | -36.054 | **-33.654** |
| 2,6,7 | Fyrisitingarútreiðslur / Administrationsomkostninger | -27.023 | -22.137 |
| | Tekningarútreiðslur / Erhvervelsesomkostninger | -614 | -539 |
| | Provisiónir frá endurtryggingum / Provisioner fra genforsikringsselskaber | 813 | 1.646 |
| | **Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / Forsikringsmæssige driftsomkostninger f.e.r.** | -26.824 | **-21.030** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit / Forsikringsteknisk resultat** | 4.226 | **4.532** |
| | Inntøkur av fastari ogn / Indtægter af fast ejendom | -38 | -43 |
| 3 | Rentur og vinningsbýti v.m. / Renter og udbytter m.v. | 7.045 | 4.708 |
| 4 | Virðisjavnan av íløguognum / Kursreguleringer af investeringsaktiver | -899 | -884 |
| | **Inntøkur av íløguognum / Indtægter af investeringsaktiver** | 6.108 | **3.781** |
| | **Flutt til tryggingartekniska rentu / Overført til forsikringsteknisk rente** | -1.897 | **-1.346** |
| | **Úrslit av íløguvirksemi / Resultat af investeringsvirksomhed** | 4.211 | **2.435** |
| | **Úrslit undan skatti / Ordinært resultat før skat** | 8.437 | **6.967** |
| **5** | **Skattir / Skatter** | -1.519 | **-1.261** |
| | **Ársúrslit / Årets resultat** | 6.918 | **5.706** |
| | **Býti av rakstrarúrsliti / Fordeling af resultat** | 6.918 | **5.706** |
| | **Flutt frá undanfarnum árum / Overført fra tidligere år** | 12.450 | **36.744** |
| | **Tøkar / Til disposition** | 19.368 | **42.450** |
| | **Nýtt til vinningsbýti / Anvendt til udbytte** | 19.000 | **30.000** |
| | **Framflutt úrslit / Overført resultat** | 368 | **12.450** |
| | **Tilsamans / I alt** | 368 | **12.450** |

| Note | DKK 1.000 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|
| | **Ogn / Aktiver** | | |
| 8 | Fastar ognir / Faste ejendomme | 980 | 980 |
| 10 | Lánsbrøv / Obligationer | 46.057 | 52.163 |
| | **Íløguognir / Investeringsaktiver** | **47.037** | **53.143** |
| 11 | Áogn hjá tryggingartakarum / Tilgodehavende hos forsikringstagere | 12.801 | 11.546 |
| 12 | Áogn hjá tryggingarfeløgum / Tilgodehavende hos forsikringsselskaber | 0 | 1.291 |
| 13 | Onnur áogn / Andre tilgodehavender | 296 | 49 |
| | **Áogn / Tilgodehavende** | **13.097** | **12.886** |
| 9 | Edv, innbúgv, bilar o.a. / Edb, inventar, biler m.v. | 263 | 556 |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn / Kassebeholdning og anfordringstilgodehavender | 95.314 | 113.147 |
| | **Aðrar ognir / Andre aktiver** | **95.577** | **113.703** |
| | **Tíðaravmarkingar / Periodeafgrænsningsposter** | **2.772** | **3.348** |
| | **Ognir tilsamans / Aktiver i alt** | **158.483** | **183.080** |
| | **Skuld / Passiver** | | |
| | Partapeningur / Aktiekapital | 40.000 | 40.000 |
| | Yvirkursgrunnur / Overkursfond | 44.975 | 44.975 |
| | Framflutt úrslit / Overført resultat | 368 | 12.450 |
| 14 | **Eginpeningur / Egenkapital** | **85.343** | **97.425** |
| | Avsett til tryggingargjøld, brutto / Bruttopræmiehensættelser | 20.428 | 17.178 |
| | Partur hjá endurtryggingini / Genforsikringsandel | -472 | -195 |
| 15 | **Avsett til tryggingargjøld f.e.r. / Præmiehensættelser f.e.r.** | **19.956** | **16.983** |
| | Avsett til skaðagjøld, brutto / Erstatningshensættelser, brutto | 17.050 | 23.927 |
| | Partur hjá endurtryggingini / Genforsikringsandel | -670 | -1.425 |
| | **Avsett til skaðagjøld f.e.r. / Erstatningshensættelser f.e.r.** | **16.380** | **22.502** |
| | **Aðrar avsetingar / Andre hensættelser** | **0** | **0** |
| 16 | Skuld í samband við endurtrygging / Gæld i forbindelse med genforsikring | 1.025 | 421 |
| | Partafelagsskattur / Selskabsskat | 1.766 | 1.261 |
| | Onnur skuld / Anden gæld | 3.767 | 4.433 |
| | Vinningsbýti fyri roknskaparárið / Udbytte for regnskabsåret | 19.000 | 30.000 |
| | **Skuld / Gæld** | **25.558** | **36.115** |
| 17 | **Tíðaravmarkingar / Periodeafgrænsningsposter** | **11.246** | **10.055** |
| | **Skuld tilsamans / Passiver i alt** | **158.483** | **183.080** |

| | DKK 1.000 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Tryggingarteknisk renta / Forsikringsteknisk rente** | | |
| | Tryggingarteknisk renta er roknað sum 4,34% av miðal burturleggingum fyri tryggingarvirksemi f.e.r. / Forsikringsteknisk rente er beregnet som 4,34 % af de gennemsnitlige forsikringsmæssige hensættelser f.e.r. | | |
| 2 | **Fyrisitingarútreiðslur / Administrationsomkostninger** | | |
| | Í upphæddini eru íroknaðar hesar avskrivingar / I beløbet indgår følgende afskrivninger: | | |
| | Maskinur og innbúgv / Maskiner og inventar | 71 | 123 |
| | Bilar / Biler | 222 | 222 |
| | Fastogn / Fast ejendom | 0 | 0 |
| | Tilsamans / I alt | 293 | 345 |
| 3 | **Rentur og vinningsbýti / Renter og udbytte m.v.** | | |
| | Renta av lánsbrøvum / Renter af værdipapirer | 3.113 | 2.179 |
| | Renta av innlánum / Renter af indlån | 3.932 | 2.529 |
| | Renta av íløgugrunni / Rente af investeringsfond | 0 | 0 |
| | Vinningsbýti av partabrøvum / Udbytte af aktier | 0 | 0 |
| | Tilsamans / I alt | 7.045 | 4.708 |
| 4 | **Virðisjavnan av íløguognum / Kursreguleringer af investeringsaktiver** | | |
| | Virðisjavnan av íløguognum / Kursreguleringer af investeringsaktiver | -899 | -884 |
| | Tilsamans / I alt | -899 | -884 |
| 5 | **Skattur / Skat** | | |
| | Skattur av skattskyldugari inntøku / Skat af skattepligtig indkomst | 1.766 | 1.262 |
| | Javnan av útsettum skatti viðvíkjandi ársúrslitinum / Regulering af udskudt skat vedrørende årets resultat | -247 | -1 |
| | Tilsamans / I alt | 1.519 | 1.261 |
| 6 | **Leiðslu- og starvsfólkaviðurskifti / Ledelses- og medarbejderforhold** | | |
| | Umroknað til fulla tíð hava í miðal starvast 31 fólk í felagnum í roknskaparárinum / Omregnet til fuldtidsansatte har der i gennemsnit i regnskabsåret været ansat 31 personer. | | |
| | Útreiðslurnar til lønir, eftirlønir o.a. kunnu sundurgreinast soleiðis / Den samlede udgift til lønninger, pensioner m.v. udgør til: | | |
| | Nevnd / Bestyrelse | 144 | 84 |
| | Stjórn / Direktion | 2.204 | 1.445 |
| | Fyri onnur starvsfólk er upphæddin / For øvrige medarbejdere udgør beløbet: | | |
| | Lønir / Lønninger | 11.617 | 8.815 |
| | Eftirlønir / Pensioner | 880 | 715 |
| | Sosialar útreiðslur / Social sikring | 1.057 | 761 |
| 7 | **Gjald til grannskoðarar / Revisionshonorar** | | |
| | Gjald til lógásetta grannskoðan / Honorar for lovpligtig revision | 163 | 164 |
| | Aðrar veitingar / Andre ydelser | 0 | 24 |

| | DKK 1.000 | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|
| 8 | **Fastar ognir / Faste ejendomme** | | |
| | Útveganarvirði / Anskaffelsespris | 980 | 1.960 |
| | Tilgongd / Tilgang | 0 | 0 |
| | Frágongd / Afgang | 0 | 980 |
| | Avskriving undanfarin ár / Tidligere års afskrivning | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum /Årets afskrivning | 0 | 0 |
| | Bókað virði 31.12 / Bogført værdi 31.12 | 980 | 980 |
| | | | |
| 9 | **Edv, innbúgv og bilar o.a. / Edb, inventar og biler m.v.** | | |
| | Útveganarvirði / Anskaffelsespris | 2.119 | 1.571 |
| | Tilgongd / Tilgang | 0 | 712 |
| | Frágongd / Afgang | 0 | 164 |
| | | 2.119 | 2.119 |
| | Avskriving undanfarin ár / Tidligere års afskrivning | 1.563 | 1.218 |
| | Avskrivingar í árinum / Årets afskrivning | 293 | 345 |
| | | 1.856 | 1.563 |
| | Bókað virði 31.12 / Bogført værdi 31.12 | 263 | 556 |
| | Harumframt er avskrivað beinleiðis í rakstri / Årets straksafskrivninger | 1.902 | 2.525 |
| | | | |
| 10 | **Lánsbrøv / Obligationer** | | |
| | Kursvirði við ársbyrjan / Kursværdi primo | 52.163 | 37.353 |
| | Kursvirði við árs enda / Kursværdi ultimo | 46.057 | 52.163 |
| | | | |
| 11 | **Áogn hjá tryggingartakarum / Tilgodehavender hos forsikringstagere** | | |
| | Eftirstøður / Præmierestancer | 3.296 | 2.765 |
| | Frammanundan uppkravt / Forudfaktoreret | 9.505 | 8.780 |
| | Tilsamans / I alt | 12.801 | 11.545 |
| | | | |
| 12 | **Áogn hjá tryggingarfeløgum / Tilgodehavender hos forsikringsselskaber** | | |
| | Endurtryggingarpartur av skaðagjøldum / Genforsikringens andel af udbetalte erstatninger | 0 | 1.291 |
| | Endurtryggingarprovisión tilgóðar / Tilgodehavende genforsikringsprovision | 0 | 0 |
| | Tilsamans / I alt | 0 | 1.291 |
| | | | |
| 13 | **Onnur áogn / andre tilgodehavender** | | |
| | Postverk Føroya / Postverk Føroya | 7 | 7 |
| | Skattaogn (støðisogn) / Skatteaktiver (anlægsaktiver) | 289 | 42 |
| | Tilsamans / I alt | 296 | 49 |

## 14 Eginpeningur / Egenkapital

| | Parta-peningur / Aktiekapital | Yvirkurs grunnur/ Overk.fond | Fluttur vinn-ingur / Over-ført resultat |
|---|---|---|---|
| Ársbyrjan 2006 / Primo 2006 | 40.000 | | |
| Yvirkursgrunnur 2006 / Overkursfond 2006 | | 44.975 | |
| Tiltaksgrunnur / Reservefonde | | | 0 |
| Ársúrslit / Årets resultat | | | 6.918 |
| Fluttur vinningur / Overførte resultater | | | 12.450 |
| Vinningsbýti / Udbytte | | | -19.000 |
| Árslok 2007 / Ultimo 2007 | 40.000 | 44.975 | 368 |

Eginpeningurin er grundkapitalurin í felagnum.
Solvensmarginin, ið er lógarinnar minstakrav til grundkapitalin, er við árs enda tkr. 13.283
Grundkapitalurin er 640 % av solvensmargin /
Egenkapitalen er selskabets basiskapital.
Selskabets solvensmargin, der er lovgivningens minimumskrav til basiskapitalen, udgør ved regnskabsårets afslutning tkr. 13.283

Basiskapitalen udgør 640 % af solvensmargin.

## 15 Avsett til tryggingarvirksemi f.e.r. / Forsikringsmæssige hensættelser f.e.r.

Tryggingar felagsins, tó tryggingar hjá størri skipum undantikið, hava leypandi høvuðsforfall, sum inniber, at tær einstøku tryggingarnar hvør einsæris hava gjaldingardag tann 1. í mánaðinum.
Tryggingargjaldið verður antin goldið kvartárliga, hálvárliga ella árliga.
Tryggingarnar hjá størri skipum hava allar høvuðsforfall tann 1. januar, og tryggingargjaldið fyri hesar verður goldið kvartárliga. Inntøkan er samsvarandi tíðaravmarkað. /
Selskabets forsikringer, bortset fra forsikringer for større skibe, har løbende hovedforfald, hvilket indebærer, at de enkelte forsikringer vil have betalingsdato individuelt den 1. i en måned.
Præmien betales enten kvartalsvis, halvårsvis eller helårligt. Selskabets forsikringsportefølje for større skibe har hovedforfald til 1. januar, og præmien for disse forsikringer betales kvartalsvis. Præmieindtægten er periodiseret tilsvarende.

## 16 Skuld í samband við endurtrygging / Gæld i forbindelse med genforsikring

| | **2007** | **2006** |
|---|---|---|
| Upphæddin er millumrokning við endurtryggingarfeløg / Beløbet udgør mellemværender med genforsikringsselskaber. | 1.025 | 421 |

## 17 Tíðaravmarkingar / Periodeafgrænsningsposter

Í upphæddini eru goldin ikki fallin tryggingargjøld /
Beløbet omfatter betalte endnu ikke forfaldne præmier

Ársroknskapurin verður lagdur fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning /
*Årsregnskabet indstilles til generalforsamlingens godkendelse.*

Tórshavn, tann 29. februar 2008 / Tórshavn, den 29. februar 2008

**Stjórnin / Direktionen**

Jean Djurhuus

**Nevndin / Bestyrelsen**

Janus Petersen
Formaður / *Formand*

Súni Schwartz Jacobsen

Christian Andreasen

Niels Juul Andersen

Tummas Hanus Dam

Hesin roknskapur er soleiðis samtyktur á ársaðalfundi í P/F TRYGD tann 29. februar 2008
*Dette regnskab er således godkendt på generalforsamlingen i P/F TRYGD den 29. februar 2008*

Fundarstjóri / Dirigent
Christian Andreasen

Ársroknskapurin fyri 2007 fyri P/F TRYGD er grannskoðaður av innanhýsis grannskoðanini í P/F FØROYA BANKA.

*Årsregnskabet for 2007 for P/F TRYGD er revideret af den interne revision i P/F FØROYA BANKA.*

Tórshavn, tann 29. februar 2008 / *Tórshavn , den 29. februar 2008*

Petur A. Johannesen

Grannskoðanarleiðari / *Revisionschef*

Vit hava grannskoðað tann av leiðsluni gjørda ársroknskap fyri 2007 fyri P/F TRYGD.

**Framda grannskoðanin**

Vit hava fyrireikað og framt grannskoðanina í samsvari við vanliga góðkendar grannskoðanarreglur við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársroknskapurin ikki inniheldur týðandi feilir ella manglar. Út frá eini meting um týdning og vanda hava vit undir grannskoðanini eftirkannað grundarlagið og skjalaprógvið undir teimum í roknskapinum uppsettu upphæddum og upplýsingum annars. Í hesi hava vit tikið støðu til nýttu roknskaparreglurnar og roknskaparligu metingarnar og hava mett, um upplýsingarnar í ársrokniskapinum sum heild eru nøktandi. Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Okkara fatan er, at ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við krøvini í lóggávuni um roknskaparframløgu, og at ársroknskapurin hevur eina rættvísandi mynd av ogn, eginpeningi, burturleggingum og skuld felagsins, tí fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

Vi har revideret det af ledelsen aflagde årsregnskab for 2007 for P/F TRYGD.

**Den udførte revision**

Vi har tilrettelagt og udført revisionen i overensstemmelse med almindeligt anerkendte revisionsprincipper med henblik på at opnå en begrundet overbevisining om, at årsregnskabet er uden væsentlige fejl eller mangler. Under revisionen har vi ud fra en vurdering af væsentlighed og risiko efterprøvet grundlaget og dokumentationen for de i årsregnskabet anførte beløb og øvrige oplysninger. Vi har herunder taget stilling til den anvendte regnskabspraksis og de regnskabsmæssige skøn samt vurderet, om årsregnskabets informationer som helhed er fyldestgørende. Revisionen har ikke givet anledning til forbehold.

**Konklusion**

Det er vor opfattelse, at årsregnskabet er aflagt i overensstemmelse med lovgivningens krav til regnskabsaflæggelsen, og at det giver et retvisende billede af selskabets aktiver og passiver, økonomiske stilling samt resultat.

Tórshavn, tann 29. februar 2008 / *Tórshavn, den 29. februar 2008*

**SPEKT**

Statsaut. Revisorar Sp/f /
*Statsaut. Revisorer Sp/f*

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor /
*statsautoriseret revisor*

Jákupa Mikkelsen
cand. merc. aud.

**Rasmussen & Weihe, P/F**

Statsautoriserað grannskoðarafelag

Ole Guldborg Nielsen
løggildur grannskoðari